# Røtt raðfesting av lívsins innihaldi

Ein lærari stóð uppi við talvuna. Tá tímin byrjaði, tók hann eitt tómt súltutoysglas og fylti tað við stórum steinum. Tá tað ikki rúmtust fleiri steinar í glasið, spurdi hann næmingarnar, um glasið nú var fult. Allir næmingarnir vóru samdir um, at tað var tað.
So tók lærarin nakrar smásteinar fram. Hann legði teir varliga niður í glasið, ímeðan hann risti tað. Tá duttu smásteinarnir niður ímillum stóru steinarnar. Tá glasið var fylt til tromina, spurdi lærarin aftur, um glasið nú var fult. Aftur hesuferð vóru næmingarnir samdir um, at nú var glasið fult.
Síðani tók lærarin eina eskju við sandi upp á pultin og stoytti sandin niður í glasið. Sandurin legði seg í allar tær rivur, ið vóru ímillum stóru steinarnar og smásteinarnar. Og næmingarnir vóru samdir um, at nú var glasið fult.
So tók lærarin ein kopp av kaffi og tømdi koppin niður í glasið. Vætan fylti plássið, sum var eftir ímillum sandkornini. Tá flentu næmingarnir.
– Nú, segði lærarin, – skulu tit ímynda tykkum, at hetta glasið er lív tykkara. Teir stóru steinarnir eru tey týdningarmiklu tingini í lívinum, t.d. foreldur, systkin, familja, ein góð heilsa, vinir tykkara, tykkara vitan og alt tað, tit duga. Hetta eru tey tingini, sum fáa tykkum at kenna, at tit hava eitt ríkt lív, hóast tit ikki skuldu havt so nógv annað.
– Smásteinarnir eru onnur tingi tykkara lívið, sum ikki eru so týdningarmikil, t.d. súkklan, fartelefonin, mótaklæðini, stereoanleggið o.s.fr. Sandurin er so alt hitt, sum harnæst fyllir lív tykkara, greiddi lærarin frá.
- Síggja tit; um tit fyrst fylla glasið við sandi, so verður einki pláss til smásteinar og stórar steinar. Hetta sama er galdandi fyri lív tykkara. Um tit nýta alla tykkara tíð og orku til smá, týdningarleys ting, so verður tað ikki pláss fyri stóru og virðismiklu tingunum.
– Tit mugu tí hugsa um, hvat hevur týdning. Vitja familjuna, ver ein góður vinur, ansa tær eftir heilsuni, et rættan mat. Hóast tú raðfestir hesi tingini høgt, hevur tú jú allíkavæl tíð til frítíðarítriv, ein túr í biograf ella á café, og allan hin "sandin og smásteinarnar"
Tit mugu tí gera tykkum greitt, hvat tit rokna sum stórar steinar, og hvat veruliga hevur nakað at siga fyri tykkum, tí restin er jú bara sandur!
Tá lærarin var liðugur at tosa, var tað púra kvirt í flokkinum. So rætti ein genta hondina upp, og við undrunarsomum eygum, spurdi hon – Hví stoytti tú so kaffi í?
Lærarin smílti og svaraði: - Eg eri sera fegin um, at tú spyrt. Tí ætlan mín við kaffikoppinum var at vísa tykkum, at líkamikið hvussu fult tykkara lív sær út til at vera, so er altíð pláss til ein kopp av kaffi við vinunum.



Mynd: Polfoto

# Uppskrift til ein væleydnaðan dag



**Tilfar:**
**Ein kopp av blídligum orðum.**
**Tveir koppar av sátt og semju.**
**Fýra súpiskeiðir av tíð og toli.**
**Rokað mál av heitum hjartalagi.**
**Eina fitta nøgd av góðum hýri.**

**Tilgerð:**
**Viga orðini væl, koyr sátt og semju í.**
**Gev tær góðar stundir -gloym ikki tolið.**
**Rør væl saman við tí heita hjartalagnum yvir eldinum.**
**Má ikki kóka.**
**Halt hitanum á 37,5 stigum og hav allatíðina góða hýrin kláran.**
**Smakka til við lívsins kryddurtum.**
**Verður borðreitt í nøgdum, sum nú hvørjum einstøkum tørvar.**

# Skemt

Tey trý tíðarskeiðini hjá manninum:
1. Hann trýr á jólamannin
2. Hann trýr ikki á jólamannin
3. Hann er jólmaðurin

**– Hevur tú hoyrt, at jólamaðurin nú er arbeiðsleysur?**
**– Nei! Hvussu ber tað til?**
**– Hann hevur fingið sekkin**

Jólamaðurin hevur ein heilt greiðan og góðan boðskap: Vitja fólk einaferð um ári!

*Victor Borge*

**– Hvussu ber tað til, at tað bert finnast kavamenn og ongar kavakvinnur?**
**– Tí einki konufólk hevði verið so býtt at staðið úti í kavanum ein heilan vetur.**

– 1000 takk fyri jólagávuna eg fekk frá tær, omma!
– Áh tað var einki at takka fyri, góði.
– Nei, tað haldi eg heldur ikki, men tað helt mamma..

**Vinkonan – Hevur tú hoyrt at jólaaftan verður ein fríggjadag í dag?**
**Blondinan: – Áh nei, so hopi eg bara ikki at tað verður tann 13.**

– Hvat fært tú um tú parar ein kavamann og ein vampyr?
– Frostbit!